# Dirvi og dreymar í Rákinum



Tað er altíð spennandi at eygleiða og gleðast um, hvussu ymisk vit eru. Sum lívið hevði verið keðiligt, um øll vóru líka. Hugsa tær, vóru allir føroyingar baptistar við bláum sum yndisliti, ella tjóðveldisfólk við einum serligum veikleika fyri týskum marcipani.

Í Rákinum hesaferð kanst tú lesa um fólk, sum tilvitað hava valt at liva lívið soleiðis, sum tey allarhelst vilja.

Vit hava vitjað parið, sum hevur dirvi til at útliva sexuallu dreymar sínar saman við øðrum føroyingum. Í Kunoy finna vit havnarkvinnuna, sum fann frælsið í Norðoyggjum. Saman við einum risabólki av donskum KT-serfrøðingum, fáa vit eitt kick, tá vit saman við teimum bjóða lívinum av í føroysku náttúruni, og niðri á Christianshavn situr unga kvinnan og seymar hárprýði, ið selja sum heitt breyð, bæði í Danmark og her á landi.

Eydnuna finna vit ikki í túninum hjá grannanum. Hóast hann kanska bæði hevur húsvogn, stuttleikabát og fýrahjólstrekkjara, hund við ættartalvu, Harley, terrassu og ross - og eitt hetroseksuelt monogamt hjúnalag. Í roynd og veru havi eg hugsað um at fáa mær eitt slangubúr í havan og at byggja eitt høgt torn upp á raðhúsið, so eg fái betri útsýni og víðari sjónarring.

Men nú fáa vit at síggja. Í fyrstu atløgu er ein kaffimunnur og Rákið á skránni.

*Rigmor*

• • •

RÁKIÐ – SUMMAR 2009
Postbox 76, 110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

REDAKTØRUR
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

BLAÐFÓLK
Eydna Skaale
Rógvi Nybo
Eilen Antoniussen
Eirikur í Jákupsstovu
Rigmor Dam
Barbara Holm

MYNDIR
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen

LÝSINGAR
Marknaðardeildin
lysing@sosialurin.fo

ÚTGEVARI
Sp/f Sosialurin

PERMUMYND
Barbara og Malan
Klæðir: Klivin
Smyrsl: The Body Shop
Gucci sólbrillur: Skilling
Blómur: Akkuleya
Vespa scootarin er privat ogn og fæst hjá Mc-søluni
Lagt til rættis: Ragnhild Dam



S. 56








S. 18



S. 18



S. 24

12 síður um ekortið hjá Eik og handlar, har tú kanst brúka ekortið

## Innihald

**Kynslív:** Kom í song við okkum .............. S. 6–7
**Móti:** Feminina – hugkot og tips ........... S. 10–11
**Kvinnumynd:** Elvira ger hárprýði......... S. 14–15
**Klumma:** Kløn við kálkuri ....................... S. 17
**Kvinnumynd:** Tjekkað í Kunoy........... S. 18–21
**Rundanum:** Teir elska stilettir.............. S. 24–26
**Heimið:** Hvør býr í stovunum? ........... S. 40–42
**Móti:** Fýra síður catwalk ..................... S. 44–45
**Lívsstílur:** Gírig ella genial .............. S. 44–45
**Hús og heim:** Lekrir litir til heimið ......... S. 50–51
**Frásøgn:** Føroyskt adrenalinsjokk ......... S. 52–53
**Móti:** Hon lærir fólk at klæða seg ......... S. 56–57
**Vox-pop:** Mín fyrsti mussur ..................... S. 58
**Rørsla:** At renna rímar við at flenna ...... S. 60–61